# NØVN Í VIKUNI

Telefon 341800 - Fax 341801 - Fartelefon 216135
e-mail: maggi@sosialurin.fo

Á hesum síðum bera vit tíðindi um merkisdagar, so sum rundar føðingardagar, brúdleypsdagar, starvssetanir o.t.

## Skótaarbeiði í Sørvági endurstovnað



*Eldsálir í Sørvági hava nú tikið stig til at endurstovna skótarnar í bygdini*

*Mynd: Jákup Suni Lauritsen*

Nú er lív komið aftur í skótaarbeiðið í Sørvági.

Tað eru Thordis Lorentzen og Erik Hansen, sum eru eldsálirnar aftanfyri tiltakið.

Thordis hevur seinastu árini verið virkin skótaleiðari í Danmark.

Fyrsta dagin vóru eini 50 børn og ung samlað í Róðrarneystinum, so sigast má at áhugin er sera stórur.

Sørvágs kommuna hevur eisini sýnt hesum arbeiðinum áhuga, og hevur m.a. játtað pening til hetta endamálið.

**Sb.**

## Vága Floghavn nýggja heimasíðu



**Vága Floghavn hevur fingið nýggja heimasíðu við nógvum nýggjum møguleikum, har tú fart munandi meira at vita um floghavnina og tað sum har til hoyrir**

**HEIMASÍÐA**
*Barbara Tausen*

Vága Floghavn hevur fingið nýggja heimasíðu, ið er rættuliga nógv víðkað í mun til ta gomlu. Heimasíðan hevur nógvar hentar upplýsingar til ferðafólk, og eisini onnur kunna fáa gleði av henni.

Nógvir heintr upplýsingar finnast, so sum nær og hvar flogførini koma og fara, vevmyndatól er av forplássinum, so tað eisini sæst um flogførini eru komin ella farin. Veðurupplýsingar eru eisini at finna. Hagtøl vísa eisini hvaðani ferðafólkini koma og hvar tey fara, seinkingar, farmamongdir v.m.

Leikjur eru til aðrar heimasíður, har ein kann finna fram prísir o.l.

Nógv hagtøl eru á síðuni um m.a. talið av ferðafólkum, fráferðum/komum hvønn mánað. Hópin av myndum av flogførum, tyrlum, og hendingum eru at finna á heimasíðuni.

Hetta kann vera sera hent hjá ferðafólki, ið ferðast ofta, og eisini til tey ið ikki vita hvussu tey skula koma til og frá floghavnini.

Heimasíðan ber heitið www.floghavn.fo

Fyri 30 árum síðan:

## Froyður koppaði í 1975




*Her liggur nýggjasta farið í føroyska fiskiflotanum við botninum uppeftir.*

*Hendingin fór fram stutt áðrenn middag 21. november 1975, tá nýggi ísfiskatrolarin Froyður skuldi fara frá bryggju í Runavík og yvir um havnina at taka ís frá flakavirkinum Lynfrost til nýggjan túr. Skipið legði seg, av óskiljandi orsøkum, á liðina, og eftir stuttari løtu fór tað runt og fleyt við botninum uppeftir.*

*Tað eydnaðist tíbetur øllum, sum umborð vóru, at sleppa av skipinum í evstu løtu. Tann seinasti mátti loypa á sjógv.*

*12. desember var Froyður togaður á rættkjøl av flótikrana, sum var komin úr Týsklandi.*

*Leggið til merkis hvussu fá hús eru á myndini í mun til í dag.*

*Kelda: Myndaárbókin - árið ið fór*